Grønlandstíðindi Kári við Stein

## Grønlandstíðindi:

# Góð veiða eftir svartkalva og rækjum

### Vit hava frætt frá Kára við Stein í Sisimiut



Av misgávun lá eftir seinast, at 4. juli var Atlantic Enterprice á veg til Anthony í Canada at landa 930 tons av svartkalva, sum teir hava fiskað í 42 samdøgur. Tað er óført fiskarí. Teir hava fiskað á 62 30 N, og ta síðstu vikuna royndu teir á 54 00 N. Tann túrin var Bo Basse skipari. Túrin eftir varð tað Villiam Hansen á Toftum. Hendan túrin skulla teir fiska helvt um helvt svartkalva og rækjur.

21. juli
Í dag er dýrdarveður. Qaqatsiaq kom inn til Nuuk at landa í dag. Markus kom eisini til Nuuk at skifta fólk. Teir hava fulla last, eisini henda túrin. Teir fara víðari til Hirtshals við lastini og síðani til Fredericia í dokk. Sisimiut landar eisini í Nuuk. Teir hava gott og væl 300 tons av toskaflaki. Sum tað skilst er toskakvotan liðugt fiskað, og nú fara teir so at royna eftir svartkalva.

22. juli
Í dag er dýrdarveður. Lómur kom inn til Illulisat at landa í morgun. Teir hava 125 tons inni og skulla sigla aftur í kvøld. Regina C kom inn til Manitsoq at landa í morgun. Akamalik kom inn higar at landa í kvøld. Tað er alt fult hjá teimum. Skiparin Linjohn Christiansen sigur, at yvirhøvur hevur fiskaríið veri gott hjá øllum trolarunum hesa síðstu tíðina. Rækjuprísurin er so spakuliga við at ganga uppeftir. Tað treingir nokk eisini til. Hendan túrin hjá Akamalik hevur lastin hjá teimun eitt virði uppá gott 9 mill, hetta er óført.

23. juli
Í dag er dýrdarveður. Ocean Tiger kom inn í morgun at landa, men teir sluppu ikki framat fyrrenn Akamalik loysti í kvøld kl. 2100 til nýggjan túr. Ocean Tiger hevur 450 tons inni. Onkrir av føroyingun umborð flotaðu Mob-bátin og so á flot. Agnið er fyrsta floks. Teir brúka 90/120 nýfiskaðar rækjur. Teir høvdu eitt lítið rend seinnapartin og fingu einar 3-4 kurvar av góðum toski.

24. juli
Í dag er dýrdarveður. Ocean Tiger loysti í kvøld nýggjan túr. Føroyingarnir vóru aftur á floti í dag. Teir fingu seks kurvar av toski.

25. juli
Í dag er dýrdarveður. Tasermiut kom inn til Nuuk at landa í morgun. Í morgin leygardagin skal Polar Amaroq inn til Nuuk at landa. Lómur er á veg til Illulisat at landa. Teir hava gott 120 tons inni. Hetta er so annar túrurin í hesari viku. Hesa vikuna hevur Lómur tískil landað 250 tons av ísaðum rækjum.

27. juli
Í dag er aftur dýrdarveður. Tað er frætt frá Polar Aassik, sum er fyrrverandi Skeljabáturin Louisa L, sum lá leingi við kei í Sørvági. Polar Seeafood keypti skipið, og teir hava riggað tað um til rækjur. Teir ísa í kør. Teir kunna taka 270 kør hvønn túrin. Tað gevur um 70 tons. Teir vóru inni í Hafnafirði og tóku kør við til Aasiat, har Polar Seeafood eigur eitt rækjuvirki. Teir byrjadu fiskaríið 5. juli, og nú teir komu inn í morgun til Aasiat at landa. Hetta er sjeyndi túrurin hjá teimum. Teir koma um morgunin og sigla longu aftur seinnapartin. Siglitíðin er um 4 tímar á rækjufeltið, sum nú er. Teir fiska í tvey samdøgur. Síðsta túrin høvdu teir 11 hál, so var alt fult hjá teimun . Steffen C er inni í Manitsoq og landar í dag.

30. juli
Í dag er stilli men toka. Natarnaq kom inn at landa í morgun. Teir hava um 450 tons inni. Skeljabáturin Sonja Kiil landar eisini í dag. Teir hava knapt 20 tons inni. Nú eru teir byrjaðir at taka rognini við á skeljunum. Áður vóru skeljarnar seldar av landinum uttan rogn, tí tað skuldi vera so nógv kyksilvur í teimum, men hetta er so eingin trupulleiki í dag. Í gjár var Polar Amaroq í Nuuk og landaði, og Chr Høj var eisini i Nuuk. Nú siga søgur, at gamli Suðurvarði skal brúkast til seismiskt arbeiði út fyri Vesturgrønlandi.

3. august
Tað var greytasvart í toku í morgun, men hon lætti seinnapartin. Lómur kom inn higar í dag eftir gott 200 kørum. Teir skulla landa í Pamiut restina av hesum tørninum. Teir hava um 110 tons inni og ætla at gera eina roynd í dýpinum á veg suður eftir.